# trupulleiki innan kunningartøkni



Elektron – við gomlum og áhugaverdum myndum frá byrjan og fram til dagin í dag, nú virksemið hjá partafelagnum verður rikið úr lutfalsliga nýggjum og tryggum hølum á Staravegi á Hálsi.

### Tryggleikin

Danin, Jesper Lundorf, sum starvast hjá Livsforum A/S, helt síðan ein áhugaverdan fyrilestur um evnini og treystið til at striðast, tá ið ringast sær út.

Jesper, sum hevur drúga útbúgving innan løgregluna og herin, bæði í Danmark og aðrastaðni, hevur eitt nú verið lívverji hjá danska krúnprinsinum, og áðrenn hann steig upp á talarapallin, helt stjórin á Elektron, Niels Chr. Nolsøe, skemtandi fyri, at Jesper er eitt "sindur av einum James Bond".

Jesper tosaði um møguleikarnar at finna ta "fjaldu orkuna", tá ið veruliga stendur á, og hann vísti á hugtøk og venjingarhættir, sum kunnu nýtast bæði í ítróttarheiminum, í herinum og í vinnulívinum.

Áhugavert var at hoyra hann greiða frá, hvussu ymiskar KT-skipanir, sum eru kendar og frammi á marknaðinum, bæði kunnu brúkast og misbrúkast.




*Erik Preben Hansen, sum er seniorráðgevi hjá Forum for Outsourcing, kallaði sín fyrilestur, "Outsourcing på ledelsens agenda". Í hesum liggur, at tú gert tað, sum tú dugir best*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tá ið Jesper Lundorf hevði hildið sín fyrilestur, tók Niels Chr. Nolsøe saman um.

Áðrenn farið varð at fáa sær ein bita, steig kokkurin, Leif Sørensen, á pallin og greiddi frá øllum tí hugsandi og óhugsandi, sum føðingardagsgestirnir fingu at mata sær við, áðrenn farið varð aftur til húsa.

### Væl nøgdur

Niels Chr. Nolsøe sigur, at hann er ógvuliga væl nøgdur við føðingardagstiltakið í Norðurlandshúsinum hendan dagin, har fleiri enn 200 fólk vóru samankomin.

- Vit valdu Erik Preben Hansen og Jesper Lundorf út til endamálið. Kanska kundi Erik verið uppaftur meira ítøkiligur, men tað var áhugavert, sum hann segði. Vit halda, at útveiting (outsourcing) er áhugavert evni – at tú gert tað, tú dugir best heldur enn, at øll gera tað sama; tá liggur nógv orka niðurbundin, sum kundi verið nýtt betur. Við útveiting, har tú samstarvar við álítandi fyritøku ella starvsfelaga, kunnu uppgávurnar loysast bæði betur og bíligari, samstundis effektiviteturin og dygdin verður betur.

Stjórin heldur, at hetta geldir heilt niður til tær smæstu fyritøkurnar og niður til einstaklingin.

### Veksandi trupulleiki

- Vit valdu eisini at hava Jesper Lundorf við, tí trygdarspurningurin er vorðin ein veksandi trupulleiki innan KT-tænastuna.

Niels Chr. Nolsøe heldur, at best hevði verið, um slíkir trupulleikar vórðu loystir í størri samanhangi, soleiðis at KT-fyritøkur og KT-veitarar ikki sita hvør sær og royna at loysa hesar trupulleikar.

- Eg haldi, at fyrilesturin hjá Jesper Lundorf var ógvuliga áhugaverdur, sigur stjórin á Elektron, Niels Chr. Nolsøe.



*Marner Jacobsen er nevndarformaður í P/F Elektron, og á føðingardagstiltakinum greiddi hann frá søguni hjá felagnum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*